Opel Astra TwinTop:

# Frá coupé til cabriolet upp á 30 sekund





Opel Astra TwinTop er ein flott designaður heilársbilur, sum er væl egnaður til okkara veðurlag. Fyrimunirnir við einum slíkum bili eru, at tá takið er á, er talan um ein vanliga coupé, sum er eins tættur og heitur at sita í um veturin sum ein bilur við føstum taki, og um summarið, tá veðrið er gott, kann hann við at týsta á ein knøtt verða gjørdur um frá coupé til cabriolet upp á minni enn 30 sekund - einfalt og lætt.

Í mun til nógvar aðrar slíkar bilar hevur Astra TwinTop stórt viðførisrúm upp á heilar 440 litrar, tá hann er coupé. Opel Astra TwinTop fæst vð trimum ymiskum motorum til hesar prísir: 1,6i 16v við 105 hk (325.000 kr.), 1,8i 16v við 140 hk (340.000 kr.) og 2,0 turbo við 200 hk. (365.000 kr.).

Bilurin fæst hjá P/F Auto Service við Oyggjarvegin, sum eisini selja aðrar coupé/ cabriolet sum t.d. Opel Tigra TwinTop, Nissan Micra C+C, og Peugeot modellini 206 CC og 307 CC.

**mg**























Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR - so ert tú tryggari